

# Uppskot um stjórnarskipan longu í 2004

SJÁLVAN FLAGGDAGIN FYRI SEKS ÁRUM SÍÐAN LÆT TÁVERANDI GRUNDLÓGARNEVNDIN EITT UPPSKOT UM STJÓRNARSKIPAN ÚR HONDUM VIÐ 100 LÓGARGREINUM. FORMAÐURIN BAÐ POLITISKU FLOKKARNAR LATA VERA VIÐ AT SKERPA KLÓRNAR HVØR ÍMÓTI ØÐRUM OG Í STAÐIN FINNA SEMJU

**FÓLKARÆÐI**

**Uni Arge**
uni@sosialurin.fo

"Nú ræður um, at tjóðskaparligu mótpolarnir í føroyskum politikki ikki skerpa klórnar hvør ímóti øðrum, men at vit við eini stjórnarskipanarlóg finna eina gongda leið, har allir partar vinna seg til rættis. Stjórnarskipanin skal bert taka støði í fólksins egna vilja. Tað er bert Føroya fólk, ið kann taka avgerð um egna lagnu. Hetta má vera aðalmálið."

Við hesum orðum endaði tásitandi formaðurin í grundlógarnevndini, Jóan Pauli Joensen, formælið í bóklinginum Fyrra Flaggdagsálit, ið 25. apríl í 2004 varð handað Føroya løgmanni.

Í bóklinginum var eitt uppskot um stjórnarskipan fyri Føroyar á 100 lógargreinir. Viðmerkingarnar til einstøku lógargreinirnar vóru drúgvar og neyvar. Eisini vóru fleiri frágreiðandi tekstir í bóklinginum, ið umrøddu tilgongdina at smíða stjórnarskipanir.

Jóan Pauli Joensen greiddi frá, at ein ávísur stígur hevði verið í arbeiðinum, men at nevndin hevði gjørt av at gera eitt arbeiðsuppskot um stjórnarskipan líðugt, tí varð endin sleptur, hevði ivaleyst verið trupult at funnið hann aftur. Hann orðaði seg soleiðis:

"Tað er ikki nógvar ferðir hent, at vit her í Føroyum hava havt møguleika fyri eini so breiðari viðgerð av einum so týdningarmiklum máli, sum ikki bert hevur týdning í løtuni, men eisini fyri alla framtíð. Tað, at vit menniskju av og á saman verða sett at hugsa um, hvussu okkara samfelag skal skipast frá grundini, skerpir vit og skil og letur upp fyri nýggjum tonkum og loysnum."

## Sum eitt superego

Í bóklinginum skrivaðu løgfrøðingarnir, Bárður Larsen og Kári á Rógvi, eisini drúgva grein um stjórnarskipanina og endamálið við henni. Teir báðir hava júst svarað danska løgmálaráðnum aftur og kallað støðutakanina hjá ráðnum til føroyska stjórnarskipanaruppskotið, ið nú liggur í tinginum, fundamentalistiska og antipragmatiska.

Í 2004 vóru teir eins sannførdir og nú um, at føroyska stjórnarskipanin fer at menna Føroyar sum land. Teir nevndu, at endamálið við stjórnarskipanini eigur at vera at endurskapa Føroyar sum samfelag við at taka samanum, útdýpa og menna elligomlu virðini í landinum. Eisini søgdu teir, at føroyingar eiga at skapa eina tjóðskaparliga semju um at lýsa av nýggjum landsins stovnar, vøld og samveldisstøðu og staðfesta tey rættindi, sum fólkið í Føroyum hevur.

Teir báðir skrivaðu:

"Mangir hættir eru at lýsa eina stjórnarskipan, og ongin einstøk lýsing kann vera einsamøll. Men flestu eru samd um, at eitt høvuðsendamál við skrivaðari stjórnarskipan er at skapa støðugleika og framhald. Vit kunnu siga, at endamálið í stóran mun er, at vit skulu verja okkum ímóti okkara egna lættsinni. Modernaðar stjórnarskipanir kunnu sigast at vera tað sama fyri eitt samfelag, sum eitt superego er fyri eitt menniskja."



*Jóan Pauli Joensen, fyrrverandi formaður í grundlógarnevndini*

gjøgnum løgtingið, landsstýrið og dómstólarnar. Sagt verður eisini, at løgtingið ger landsins lógir, landsstýrið staðfestir og umsitur lógirnar, og dómstólarnir døma eftir lógunum. Her verður tann klassiska valdslæran hjá franska heimspekinginum, Montesquieu, staðfest sum galdandi í Føroyum.

Stjórnarskipanaruppskotið umrøður haraftrat alskyns rættindi og skyldur, sum borgarar í Føroyum hava, eins og grundlógir ofta gera. Eitt nú stendur, at øll eru fræls og frí sum persónar, at ongin kann revsast ella viðfarast miskunnarleyst, at javnstøða er millum fólk uttan mun til kyn, eyðkenni og frábegði, at allar ognir eru vardar ímóti ágangi, at øll eiga rætt at trúgva og útinna sína trúgv, at ein og hvør undir ábyrgd kann bera fram sína hugsan, at øll kunnu taka seg saman í feløg, at øll kunnu savnast á almennum stað, og at øll eiga rætt til undirvísing.

Aftast í uppskotinum stendur, at stjórnarskipanin skal samtykkjast á tingi og síðan á fólkaatkvøðu, og verður hon tað, skal hon setast í staðin fyri stýrisskipan Føroya, sum kom í gildi í 1994. Stýrisskipan Føroya er ikki at meta sum ein úttømandi grundlóg fyri Føroyar, men meira ein áseting um, hvussu innanhýsis stýrisskipanarligu viðurskiftini eru. Stýrisskipanarligu viðurskiftini verða eisini væl og virðiliga lýst í stjórnarskipanaruppskotinum, og tí hava uppskotsstillararnir mett, at hon kann koma í staðin fyri verandi stýrisskipan.

## FAKTA

Uppskotið um Stjórnarskipan Føroya varð lagt fyri tingið 6. mars í 2010. Umboð úr øllum flokkum løgdu tað fram.

Á ólavsøku fall uppskotið burtur, men 17. august 2010 legði Poul Michelsen, formaður í serligu grein 25-nevndini, ið viðger stjórnarskipanina, uppskotið framaftur.

Løgtingsskrivstovan hevur mælt til at burturvísa uppskotinum, tí tað gongur ímóti fleiri lógum. Formansskapurin ger av, um tingið kortini skal viðgera uppskotið.